# Fíggjarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 4. januar 2023 |
| Mál nr.: | 21/07135 |
| Málsviðgjørt: | |
| Ummælistíð: | 16.01.2023 - 13.02.2023 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**almenna talgilda postskipan**

*Virkisøki*

**§ 1.** Ásetingar í hesi løgtingslóg fevna um talgilt samskifti umvegis almennu talgildu postskipanina, nevnd Mínboks, ið landsstýrismaðurin varðar av.

*Allýsingar*

**§ 2.** Í hesi løgtingslóg merkir:

1) Sendari: Almennur stovnur, løgfrøðiligur persónur ella likamligur persónur, ið sendir upplýsingar til móttakara umvegis Mínboks.
2) Móttakari: Almennur stovnur, løgfrøðiligur persónur ella likamligur persónur, ið móttekur upplýsingar frá sendara umvegis Mínboks.
3) Samskifti: Talgild sending og móttøka millum sendara og móttakara av upplýsingum, undir hesum boð, skjøl, avgerðir og fráboðanir.
4) Atkomandi: Tá ongar forðingar eru, ið móttakarin ikki er tann nærmasti at loysa.
5) Almennur stovnur: Almennir myndugleikar, stovnar o.tíl., fevndir av § 1, stk. 1 og 2 í løgtingslóg um fyrisitingarlóg.
6) Løgfrøðiligur persónur: Løgfrøðilig eind við føroyskum vinnutali, v-tali, ið ikki er ein almennur stovnur, sbrt. nr. 5 omanfyri.
7) Likamligur persónur: Persónur við føroyskum persónstali, p-tali.

*Brúkarar*

**§ 3.** Almennir stovnar og løgfrøðiligir persónar kunnu sjálvbodnir, tó undantikið stk. 2, velja at samskifta umvegis Mínboks við tí rættarvirknaði sum fylgir av § 5.
*Stk. 2.* Almennir stovnar skulu samskifta umvegis Mínboks, við tí rættarvirknaði sum fylgir av § 5, tá ið hesir senda viðkvæmar persónsupplýsingar, sbrt.

løgtingslóg um vernd av persónsupplýsingum ella trúnaðarupplýsingar talgilt.
*Stk. 3.* Samskifti við likamligar persónar ella løgfrøðiligar persónar umvegis almennar talgildar portalar, har likamligi persónurin ella løgfrøðiligi persónurin eintýðugt kunnu eyðmerkja seg á tryggan hátt, er undantikið kravinum í stk. 2.
*Stk. 4.* Stk. 2. er ikki galdandi, um tað fylgir av aðrari lóggávu, at samskifti skal fara fram talgilt á annan hátt.

**§ 4.** Likamligir persónar, ið eru minst 15 ár, kunnu sjálvbodnir tekna seg til Mínboks, treytað av, at hesir hava talgildan samleika, sbrt. løgtingslóg um talgildan samleika, og góðtaka ásettar brúkstreytir til Mínboks.
*Stk. 2.* Almennur stovnur kann ikki krevja, at samskifti við likamligar persónar skal fara fram umvegis Mínboks, uttan so at hetta er ásett í løgtingslóg.

*Rættarvirknaður*

**§ 5.** Upplýsingar, sendar í Mínboks, roknast sum:
1) komnar fram, ta løtu upplýsingarnar eru atkomandi fyri móttakaran, og
2) at vera sendar av ásetta sendara.

*Persónstalið*

**§ 6.** Løgfrøðiligir persónar, ið samskifta umvegis Mínboks, hava heimild at fáa útflýggjað og at viðgera upplýsingar um persónstalið til eintýdda eyðmerking av móttakarum, sbr. tó stk. 2.
*Stk. 2.* Fyritreyt fyri at fáa útflýggjað persónstalið, sbrt. stk. 1, er, at løgfrøðiligi persónurin frammanundan útflýggjar landsstýrismanninum uttanhýsis KT grannskoðanarváttan, ið kann veita fullgóða trygd fyri, at hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk eru sett í verk fyri at tryggja, at óviðkomandi ikki fáa kunnleika til persónstalið, misbrúka tað ella annars ólógliga viðgera tað.

*Lýsingabann*

**§ 7.** Tað er ikki loyvt løgfrøðiligum persónum at nýta Mínboks til marknaðarføring, lýsingaátøk, o.tíl.
*Stk. 2.* Brot á stk. 1 verður revsað við sekt.
*Stk. 3.* Fyri endurtakandi brot á stk. 1 kann løgfrøðiligur persónur missa rættin til at senda umvegis Mínboks.

*Teknisk krøv o.tíl.*

**§ 8.** Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um nýtslu av almennu talgildu postskipanini, undir hesum teknisk krøv umframt stødd og tal av fílum, sum í mesta lagi kunnu sendast í hvørjari sending.

*Gildiskoma*

**§ 9.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, hon er kunngjørd, undantikið § 3, stk. 2.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð nær § 3, stk. 2 verður sett í gildi.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

*Bakgrund*

Talgildu Føroyar er ein verkætlan, sum varð skipað undir Fíggjarmálaráðnum á Gjaldstovuni í 2016. Arbeiðið í Talgildu Føroyum er grundað á tilmæli úr heildarætlan um Talgildu Føroyar frá 1. oktober 2015[1].

Fýra høvuðstættir eru í verkætlanini Talgildu Føroyar:

- Samleikin: Ein trygg elektronisk innritan og undirskrift.
- Portalur og tænastur: Ein felags inngongd, ið gevur borgaranum og vinnuni skjóta og einfalda atgongd til almennar tænastur og dátur.
- Grundardátur: Grundardáturnar eru upplýsingar um persónar, virki, fasta ogn, adressur, og talgild kort.
- Heldin: Pallur til trygt og standardiserað dátusamskifti.

Í høvuðsheitum hevur talgildingin við sær, at borgarar og fyritøkur samskifta talgilt við almenna geiran, at fyrisitingarligar tænastur hjá tí almenna eru tøkar á netinum, og at veitingar og mannagongdir í almennu fyrisitingini eru talgildar.

Endamálið við talgildingini er at nútímansgera vælferðina og tænasturnar hjá føroyingum umframt at skapa kappingarføri, vøkstur og framleiðsluorku. Harumframt skal talgildingin tryggja munandi sparingar og effektiviseringar í almenna geiranum.

Almenna talgilda postskipanin, ið henda løgtingslóg fevnir um, er partur av høvuðstættinum, Vangin. Talgilda postskipanin á Vanganum verður vanliga rópt Mínboks. Tað er henda Mínboks loysnin, ið við hesum lógaruppskotið skal gerast til almennu talgildu postskipanina í Føroyum.

Endamálið við Vanganum er at hava ein tænastuportal, har borgarin skjótt og einfalt kann finna og brúka tær almennu talgildu tænasturnar.
Við Mínboks hava føroyskir borgarar ein talgildan postkassa til trygt brævasamskifti, sum allir tænastuveitarar, almennir og privatir, skulu kunna senda til.

Mínboks er sjálvstøðug KT skipan, ið borgarin í dag hevur atgongd til umvegis Vangan. Tað er tó einki til hindurs fyri, at atgongdin til Mínboks eisini kann fara fram umvegis aðrar miðlar enn Vangan.
Talgildu Føroyar eru saman við TAKS, Skráseting Føroyar og Hagstovuni komin væl ávegis við at menna eina almenna talgilda virkisskrá til føroyska samfelagið. Ætlanin er, at tað, sum eitt næsta stig til hesa virkisskrá, verður gjørligt at fáa atgongd til sína Mínboks til virkir.

Lógaruppskotið fevnir um Mínboks til bæði privatar og løgfrøðiligar persónar.

[1] https://www.talgildu.fo/talgildu-foroyar/heildaraetlanin-2015/

Mett verður at ábyrgdin av at veita trygt talgilt brævasamskifti eigur at liggja hjá einum almennum myndugleika.

*Keyp av Mínboks frá Elektron*
P/F Mínboks og Gjaldstovan gjørdu í november 2017 sáttmála um, at Gjaldstovan yvirtók skipanirnar hjá felagnum fyri 5 mió. kr., har Gjaldstovan tók yvir báðar loysnirnar í P/F Mínboks, sum vóru Mínboks og Mínlykil.

Keypið var liður í heildarætlanina fyri Talgildu Føroyar frá 2015, har tað m.a. er ásett, at allir borgarar skulu hava ein talgildan postkassa.

*Valið av postskipan*
Orsøkin til at skotið verður upp, at Mínboks skal gerast almenna talgilda postskipanin í Føroyum, er, at loysnin lýkur krøvini um trygt talgilt samskifti, og at hon hevur virkað væl í tey yvir 10 árini, hon hevur á baki, umframt at ein stórur skari av føroyingum longu brúkar Mínboks í dag. Harafturat hevur ein føroysk fyritøka ment skipanina, og hon verður rikin í Føroyum.

Tað eru longu 35 fyritøkur og almennir stovnar sum nýta Mínboks. Nevnast kann t.d. Almannaverkið, ALS, Atlantic Airways, Betri Pensjón, Betri Trygging, Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Elektron, Føroya Arbeiðarafelag, Fjølrit, Gjaldstovan, Heilsutrygd, Landssjúkrahúsið, Lív, Norðoya Bú- og Heimatænasta, Studni, Tórshavnar kommuna, TAKS, Vága Floghavn umframt allir føroysku peningastovnarnir.

Undirtøkan fyri Mínboks er stór millum føroyingar. Samanlagt eru umleið 33.500 brúkarar í Mínboks. Í 2021 vóru 625.807 brøv send umvegis Mínboks.

### 1.2. Galdandi lóggáva
Tað finst ongin lóggáva á økinum í dag.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við lógaruppskotinum er at gera Mínboks til ta almennu talgildu postskipanina í Føroyum.

Harumframt hevur lógin tvey onnur høvuðsendamál. Hesi eru:

1. At áseta krav um, at almennir stovnar skulu samskifta umvegis Mínboks, um hesir senda viðkvæmar persónsupplýsingar ella trúnaðarupplýsingar talgilt til síni viðskiftafólk.
2. At javnstilla rættarvirknaðin av talgildum samskifti við almennu talgildu postskipanina við rættarvirknaði av skrivligum samskifti umvegis vanligan pappírspost.

Ad.1 - Við at áseta í lóg, at almennir stovnar skulu samskifta umvegis Mínboks, tá ið hesir senda viðkvæmar persónsupplýsingar ella trúnaðarupplýsingar talgilt til síni viðskiftafólk, fær borgarin tryggleika fyri, at upplýsingarnar eru í góðari varðveitslu við høgum trygdarstøði, og har trygdaravrit verða goymd.
Mínboks skal lyfta tað avbjóðing, tað kann vera hjá almennum stovnum, virkjum og øðrum, at lúka øll neyðug trygdarkrøv í sambandi við trygt talgilt samskifti við viðskiftafólk og/ella egin starvsfólk. Hetta skal tí lætta um gerandisdagin hjá hesum stovnum og virkjum, so hesi kunnu leggja sína orku á síni kjarnuøki.

Mínboks skal veita trygd fyri, at allar upplýsingar, ið verða viðgjørdar í skipanini, ikki av tilvild ella ólógliga verða burturbeindar, burturmistar ella minka í virði, og at óviðkomandi ikki fáa kunnleika til upplýsingarnar, misbrúka tær, ella annars ólógliga viðgera tær.
Einhvør viðgerð av persónsupplýsingum í Mínboks skal vera í tráð við reglurnar í dátuverndarlógini.

Mínboks skal veita trygd fyri, at samskiftið ikki verður broytt á vegnum, og at samskiftið er bronglað, so at samskiftið ikki kann lesast av óviðkomandi.

Mínboks skal vera brúkaravinarlig og løtt atkomulig hjá teimum, ið hava skerdar førleikar, so sum blind, sjónveik, deyv, tunghoyrd og øðrum. Hetta skal tryggjast við at fylgja altjóða leiðreglunum um atkomu, WCAG (Web Content Accessibility Guidelines).

Kravið til almennar stovnar viðvíkur bert viðkvæmar persónsupplýsingar sbrt. løgtingslóg um dátuvernd og um trúnaðarupplýsingar. Tað er soleiðis einki til hindurs fyri, at ein almennur stovnur nýtir almennu talgildu postskipanina til samskifti um viðkvæmar ella trúnaðarupplýsingar, meðan annað samskifti, t.d. vanlig kunning til borgaran um ávíst tiltak, kann fara fram umvegis aðrar miðlar, t.d. vanligan teldupost, sosialar miðlar o.a.

Ad. 2. - Við lógaruppskotinum verður ásett, nær upplýsingarnar (sending av skjølum, boðum og fráboðanum o.a.) umvegis Mínboks, roknast sum komnar fram. Hetta er týdningarmikið at áseta, soleiðis at samskifti, sent við Mínboks, fær sama rættarvirkna, sum postur sendur sum vanligur pappírspostur.

Tað kunnu vera fleiri støður, har tað er týdningarmikið at staðfesta, nær boðini eru komin fram, t.d.:

- um ein avgerð frá einum almennum stovni hevur eina kærufreist á t.d. 4 vikur, frá tí at avgerðin er komin fram til borgaran
- í avtaluhøpi kann vera týdningarmikið at kunna staðfesta, nær eitt tilboð ella svar uppá tilboð er komið fram, t.d. tá tilboðsgevari ásetir freist fyri at taka av tilboði (§ 2 í avtalulógini).

Við lógaruppskotinum verður ásett, at upplýsingar, sendar umvegis Mínboks, roknast sum komnar fram ta løtu, tá boðini eru atkomulig fyri móttakaran í Mínboks júst sum við vanligum pappírsposti, har upplýsingarnar (brævið) eru komnar fram til móttakaran, tá upplýsingarnar liggja í fysiska postkassanum, og eru atkomuligar hjá móttakara. Eins og tað er við brævinum í postkassanum, so er tað óviðkomandi í hesum høpi, um móttakarin hevur lisið upplýsingarnar.

Lógaruppskotið fevnir um øll sløg av upplýsingum, ið verða sendar umvegis Mínboks, undir hesum upplýsandi tilfar og fyrisitingarligar avgerðir, har tað er avgerandi, at boðini eru komin fram fyri at gerast bindandi fyri móttakaran og annað.

Harumframt verður staðfest, at upplýsingarnar sum útgangsstøði roknast sum sendar av ásetta sendara, og móttakarin kann líta á, at sendarin veruliga er tann, viðkomandi sigur seg vera. Hetta merkir, at um ein sendari vil vera við, at viðkomandi ikki er sendari av ávísum upplýsingum, hóast hesin stendur sum sendari, so hevur sendarin próvbyrðuna av, at viðkomandi ikki er sendarin.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at gera talgildu postskipanina, Mínboks, til ta almennu talgildu postskipanina í Føroyum og at áseta teir løgfrøðiligu karmarnar fyri almennu postskipanina.

Høvuðstættirnir í lógini eru, at tað verður sett sum krav, at allir almennir stovnar skulu samskifta umvegis Mínboks, tá ið hesir senda viðkvæmar persónsupplýsingar ella trúnaðarupplýsingar talgilt til síni viðskiftafólk. Og at javnstilla rættarvirknaðin av talgildum samskifti við almennu talgildu postskipanina við rættarvirknaðin av skrivligum samskifti umvegis vanligan pappírspost.

Fleiri almennir stovnar og fyritøkur nýta longu í dag Mínboks. Við hesum uppskotinum verða løgfrøðiligu karmarnir fyri loysnina fastlagdir. Serliga týdningarmikið í hesum sambandi er, at rættarvirknaður verður staðfestur um, at upplýsingar, ið eru sendar umvegis Mínboks, skulu roknast sum komnar fram ta løtu, tá boðini eru atkomulig fyri móttakaran í Mínboks.

Fyrimunir við at fáa ein almennan talgildan postkassa eru, at :

- borgarin hevur *ein* talgildan postkassa, har samskifti við almennar stovnar fer fram. Hetta ger tað lættari hjá borgaranum at hava yvirlit yvir síni viðurskifti, og skapar tryggleika fyri, at upplýsingarnar eru í góðari varðveitslu við høgum trygdarstøði.
- tað kann viðføra munandi sparingar fyri tað almenna í tíð og umsiting, um sleppast kann undan vanligum pappírsposti, og at stovnurin sleppur frá at menna egna talgilda postskipan og integration við Samleikan.
- tað gerst meiri motiverandi at nýta henda almenna postkassan bæði hjá sendarum og móttakarum, tí postkassin er integreraður í eini størri heild (á Vanganum hjá Talgildu Føroyum).
- betri gjøgnumskygni er, hvussu almennir stovnar samskifta við viðskiftafólk, og tað merkir, at borgarin skal bert halda skil á einum talgildum postkassa.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Mínboks er í dag partur av Vanganum. Raksturin av Vanganum er fíggjaður av játtanini á fíggjarlógini til Talgildu Føroyar.

Tað verður mett, at tað fer at hava positivar fíggjarligar ágóðar við sær fyri bæði land og kommunur at hava eina felags almenna talgilda postskipan, tí hvør einstakur stovnur sleppur undan at menna sína egnu talgildu postskipan, sleppur frá útreiðslum til viðlíkahald og víðari menning umframt at knýta seg í talgilda Samleikan.

Við einari almennari talgildari postskipan verður mett, at Føroyar fáa ein effektivari og smidligari almennan geira, sum verður bíligari at reka. Tað merkir, at játtaði peningurin til ymisku vælferðarøkini verður skynsamari brúktur.

Torført er at koma við beinraknum metingum um, júst hvussu nógv kann sparast við einari almennari talgildari postskipan. Tað er tó eyðsýnt, at við at senda boð talgild heldur enn við vanligum posti, kann sparast postgjald og tilfar (pappír, brævbjálvar og onnur umsiting) umframt, at avgreiðslan at senda og móttaka verður skjótari.

Tað krevur ikki stórvegis tillagingar í skipanunum hjá ymisku stovnunum hjá landinum og kommunum at knýta seg upp í almennu talgildu postskipanina, tí verður ikki mett, at hetta fer at leggja stórvegis fíggjarligar byrðar á stovnar og kommunur.

Tað kostar í dag eitt eingangsgjald á 16.000 kr. at knýta seg í Mínboks.

Harumframt verður rindað nýtslugjald fyri hvørt ”bræv”, ið verður sent ella móttikið. Prísurin er í dag 2,00 kr. pr. 100kb. Tað merkir, at brøv millum 0 til 99kb kosta 2,00 kr., brøv millum 100 til 199kb kosta 4,00 kr. Soleiðis broytist prísurin eftir støddini á hvørjum brævi. Miðalprísurin pr. bræv í 2021 var undir 3,00 kr.

Tað er ókeypis hjá brúkaranum at nýta Mínboks.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið áleggur almennum stovnum at samskifta umvegis Mínboks, um hesir senda viðkvæmar persónsupplýsingar ella trúnaðarupplýsingar talgilt. Hetta kann merkja broyttar mannagongdir fyri hesar stovnar, um hesir í dag senda talgilt umvegis aðrar miðlar.

Mett verður ikki, at tað eru nógvir almennir stovnar í dag, ið senda viðkvæmar ella trúnaðarupplýsingar umvegis aðrar talgildar miðlar enn Mínboks. Teir stovnar, ið longu nýta Mínboks, halda fram eins og áður, meðan aðrir mugu knýta seg í. Tað krevur ikki stórvegis KT kunnleika á stovnunum fyri at knýta seg í Mínboks, men hetta fer at krevja nakrar tillagingar í mannagongdunum á stovunum fyri at tryggja, at postkassin verður passaður á nøktandi hátt.

Mett verður, at tað fer at lætta umsitingarligu byrðuna hjá stovnum undir landi og kommunum, tá ið hesir fara at senda boð talgilt heldur enn við vanligum posti. Tað kann sparast postgjald og tilfar (pappír og brævbjálvar), umframt at avgreiðslan at senda verður skjótari, og sostatt kunnu hesi starvsfólk brúka tíðina til aðrar uppgávur.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Lógaruppskotið áleggur ikki beinleiðis krøv til vinnuna. Tí verður ikki mett, at lógaruppskotið ávirkar vinnuna stórvegis, uttan tað at løgfrøðiligu karmarnir verða fastlagdir, og hetta hevur týdning fyri tey virkir, ið longu nú nýta Mínboks ella ætla at knýta seg í loysnina í framtíðini. Um virkir móttaka viðkvæmar persónsupplýsingar ella trúnaðarupplýsingar talgilt frá tí almenna, so skal hetta framyvir vera umvegis Mínboks. Um hesar framyvir eisini ynskja at móttaka hesar upplýsingar talgilt, so skal tað vera umvegis Mínboks, og tí verður tað eitt óbeinleiðis krav til hesi virki at fáa sær Mínboks.

Tá fleiri almennir stovnar hava knýtt seg í almennu talgildu postskipanina, vil hetta viðføra ein effektivari og smidligari almennan geira, og hetta vil lætta um umsitingarligu byrðurnar hjá vinnuni, har tað verður lættari og skjótari at samskifta við tað almenna.

Lógaruppskotið gevur heimild til, at fyritøkur, um tær uppfylla ávís krøv um KT trygd, kunnu fáa útflýggja p-talið hjá Mínboks brúkarum. Hetta kann lætta munandi um umsitingina hjá vinnuni, í og við at tað verður lættari at eyðmerkja brúkaran, og røkka rætta móttakaran.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Mett verður, at lógaruppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri umhvørvið, av tí at talgildur postur væntandi hevur við sær minni pappírsnýtslu og minni flutning, ið hevur minni CO2 útlát við sær.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur ikki beinleiðis avleiðingar fyri serstøk øki í landinum. Tó kann sigast, at við tað at tað almenna fær eina almenna postskipan, og væntast kann at fleiri almennir stovnar fara at nýta hesa loysn, so fer tað at vera lættari og skjótari hjá fólki í útjaðaranum at avgreiða síni viðurskifti við tað almenna, tí tíðin, sum í dag fer at til senda postin aftur og fram, verður spard burtur.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Tá samskiftið við tað almenna er talgilt, verður lættari hjá sjófólki at avgreiða síni viðurskifti við tað almenna, tí postkassin er ikki knýttur at einari fysiskari adressu, og tí kann posturin avgreiðast á teldu, snildfon og teldli. Tað er bert neyðugt at hava netsamband.

Eisini kann talgilt samskifti gera gerandisdagin lættari fyri blind, sjónveik, deyv, tunghoyrd og lesiveik, tí hesi kunnu knýta talgild amboð til boðini, sum so t.d. kunnu lesa boðini upp fyri viðkomandi.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Uppskotið er mett í mun til Hoyvíkssáttmálan, Mannarættindasáttmálan og ST sáttmálan um rættindi hjá teimum, ið bera brek.

Tað er onki í lógaruppskotinum, sum er í ósamsvari við Hoyvíkssáttmálan.

Mannarættindasáttmálin: Neyðug fyrilit verða tikin í Talgildu Føroyum sum heild, so loysnin verður útførd í samsvari við Mannarættindasáttmálan.

ST sáttmálin um rættindi hjá teimum, ið bera brek: Uppskotið hevur fyrilit fyri ásetingunum í ST sáttmálanum um rættindi hjá teimum, ið bera brek, tí eingin skal so vítt gjørligt, verða forðaður í at fáa almennu talgildu postskipanina. Við at nýta almennu talgildu postskipanina gerst tað lættari hjá teimum, ið bera brek, og teimum, ið hava skerdar førleikar, tí hesi kunnu knýta talgild amboð til almennu talgildu postskipanina, sum t.d. kunnu lesa boðini upp fyri viðkomandi.

Mínboks skal vera brúkaravinarlig og løtt atkomulig hjá teimum, ið hava skerdar førleikar, so sum blind, sjónveik, deyv, tunghoyrd og øðrum. Hetta skal tryggjast við at fylgja altjóða leiðreglunum um atkomu, WCAG (Web Content Accessibility Guidelines).

**2.9. Marknaforðingar**
Mett verður ikki, at lógaruppskotið elvur til marknaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Í § 7 stk. 2 og 3 er ásett, at brot á lýsingabannið í § 7, stk. 1 verður revsað við sekt, og um brotið endurtekur seg, kann viðkomandi missa rættin at senda umvegis Mínboks.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Ikki viðkomandi.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið inniheldur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Nei.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**

**§ 8**
Ásett verður í § 8, at avvarðandi landsstýrismaðurin kann áseta nágreiniligari reglur um nýtslu av Mínboks, undir hesum teknisk krøv og stødd og tal av fílum, sum í mesta lagi kunnu sendast pr. fráboðan.

Teknisk krøv eiga ikki at verða ásett í sjálvum lógartekstinum, tí at teknisk krøv til talgildar skipanir sum Mínboks, skulu kunna tillagast nýggja tøkni, sum mennist skjótt. Fyri at fáa eina smidliga og tíðarhóskandi loysn, er betri at geva avvarðandi landsstýrismanninum heimild at áseta nágreiniligari reglur um hesi viðurskifti í kunngerð.

**§ 9, stk. 2**
Landsstýrismaðurin fær heimild til at áseta í kunngerð nær § 3, stk. 2 verður sett í gildi.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

## 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Ja |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | [redacted] | | Nei | Nei | [redacted] |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina**

**Til § 1**

Ásett verður, at lógin fevnir um talgilt samskifti umvegis almennu talgildu postskipanina, nevnd Mínboks, ið landsstýrismaðurin varðar av. Við hesum verður yvirskipaða ábyrgdin fyri Mínboks formliga løgd hjá avvarðandi landsstýrisfólki.

Við hesum fær Mínboks støðu sum almenna talgilda postskipanin í Føroyum.

**Til § 2**

*Til nr. 1)*
Ein sendari er í hesi lóg ein almennur stovnur, løgfrøðiligur persónur (t.d. privat virki, felagsskapur) ella likamligur persónur (persónur við føroyskum persónstalið), ið sendir upplýsingar til móttakara umvegis Mínboks. T.e. at sendari er einhvør, ið nýtir Mínboks sum samskiftismiðil at senda við.

Dømi um ein sendara er, at Gjaldstovan sendir lønarseðil til ein borgara.

*Til nr. 2)*
Ein móttakari er í hesi lóg ein almennur stovnur, løgfrøðiligur persónur ella likamligur persónur, ið móttekur boð frá sendara umvegis Mínboks.

*Til nr. 3)*
Samskifti í hesi lóg merkir, sending og móttøka av øllum slagi av upplýsingum.
Samskifti fevnir um alt samskifti í Mínboks og skal ikki avmarkast til ávíst slag av samskifti ella ávíst format. Ásetingin fevnir tískil millum annað um vanligar fráboðanir, avgerðir við víðfevndum fylgjum fyri móttakara, partshoyringar sbrt. kap. 5 í fyrisitingarlógini, áminningar um t.d. læknavitjan og annað.

*Til nr. 4)*
Atkomandi merkir í hesi lóg, tá upplýsingar eru atkomuligar fyri móttakaran, og tað ikki eru forðingar, ið móttakarin ikki er tann nærmasti at loysa.

Móttakarin hevur sjálvur ábyrgd av at kunna seg um tað, ið liggur í sínari Mínboks. Tað hevur ongan týdning hesum viðvíkjandi, um móttakarin hevur trupulleikar við síni egnu teldu ella t.d. hevur gloymt kotuna til Samleikan, tí hetta eru trupulleikar, ið móttakarin er tann nærmasti at loysa.

Um trupulleikar harafturímóti eru við Mínboks (t.d. KT skipanin handan Mínboks ikki er tøk), so kann hetta merkja, at upplýsingarnar ikki eru atkomandi fyri móttakaran. Sama er galdandi um loysnin til innritan, Samleikin, ikki er tøk, streymslit, einki internetsamband til Føroyar o.a. Hetta eru trupulleikar, ið ikki liggja móttakaranum nærmast at loysa.

Tá forðingar eru, ið móttakarin ikki er tann nærmasti at loysa, og upplýsingarnar í Mínboks av tí orsøk ikki eru atkomandi, verða upplýsingarnar ikki roknaðar sum komnar fram til móttakaran, fyrr enn henda forðing er burtur.

*Til nr. 5)*
Almennur stovnur merkir í hesi lóg almennir myndugleikar, stovnar o.tíl., fevndir av § 1, stk. 1 og 2 í løgtingslóg um fyrisitingarlóg.

*Til nr. 6)*
Løgfrøðiligur persónur merkir í hesi lóg, ein løgfrøðilig eind við føroyskum vinnutali, v-talið, ið ikki er ein almennur stovnur, sbrt. nr. 5 omanfyri.

Ein almennur stovnur verður vanliga sæddur sum ein løgfrøðiligur persónur, men í hesi lóg er ein skilnaður gjørdur millum hugtøkini almennur stovnur og løgfrøðiligur persónur, av tí at serlig krøv verða stillaði til almennar stovnar, ið ikki galda fyri privat virkir/aðrar eindir við v-talið.

*Til nr. 7)*
Likamligur persónur í hesi lóg merkir persónur við føroyskum persónstali, p-tali.

**Til § 3**
*Til stk. 1.*
Tað stendur sum útgangsstøði almennum stovnum og privatum virkjum frítt, at nýta Mínboks sum samskiftismiðil við síni viðskiftafólk o.o.

Um almennir stovnar velja at senda umvegis Mínboks, so eru sendu upplýsingarnar fevndar av tí rættarvirknaði, ið fylgir av § 5 um at sending av upplýsingum umvegis Mínboks, og roknast sum komnar fram ta løtu, tá upplýsingarnar eru atkomandi fyri móttakaran í Mínboks, og at hesar roknast at vera sendar av ásetta sendara.

*Til stk. 2.*
Almennir stovnar skulu samskifta umvegis Mínboks, tá ið hesir senda viðkvæmar persónsupplýsingar sbrt. løgtingslóg um dátuvernd ella trúnaðarupplýsingar talgilt til viðskiftafólk.

Hetta er ein av høvuðsásetingum í hesi lóg. Tað verður álagt almennum stovnum at nýta Mínboks um hesir senda viðkvæmar persónsupplýsingar ella trúnaðarupplýsingar talgilt til viðskiftafólk.
Forboð verður við hesum sett ímóti at nýta t.d. Facebook, Gmail, Hotmail og aðrar miðlar at samskifta við viðskiftafólk, tá talan er um viðkvæmar persónsupplýsingar ella trúnaðarupplýsingar.

Leggjast skal til merkis, at henda áseting bert er galdandi, um “hesir senda viðkvæmar ella trúnaðarupplýsingar *talgilt* til viðskiftafólk”. Um almennur stovnur sendir viðkvæmar persónsupplýsingar ella trúnaðarupplýsingar umvegis vanligan pappírspost, so er stovnurin ikki fevndur av hesi áseting.

Viðkvæmir persónsupplýsingar eru í hesi lóg upplýsingar fevndar av § 11, stk. 1 í løgtingslóg um dátuvernd. Hetta eru upplýsingar um húðarlit, ættarslag ella etniskan uppruna, politiska, átrúnaðarliga ella heimspekiliga sannføring ella yrkisfelagsligt tilknýti eins og viðgerð av ílegudátum, biometriskum dátum við tí endamáli eintýtt at eyðmerkja ein persón,

heilsuupplýsingum, upplýsingum um kynslig viðurskifti, revsiverd viðurskifti ella upplýsingar um munandi sosialar trupulleikar og onnur heilt privat viðurskifti.

Trúnaðarupplýsingar eru í hesi lóg upplýsingar, ið eru av slíkum slag, har tann vanliga fatanin í samfelagnum er, at almenningurin ikki skal fáa innlit í hesar.

Viðkvæmar upplýsingar eru ein partmongd av trúnaðarupplýsingum. Trúnaðarupplýsingar kunnu t.d. vera upplýsingar um ættarklandur, sjálvmorðsroynd, inntøku- og ognarviðurskifti, handilsloynidómar og starvsetanarviðurskifti.

Hugtakið "trúnaður" skal skiljast í tráð við revsilógina § 152 og fyrisitingarlógina kap. 8.

Sbrt. § 152, stk. 3 er talan um trúnaðarupplýsing, *"tá ið hon við lóg ella aðrari gildigari áseting er nevnd so, ella tá ið tað aðramáta er neyðugt at halda hana loyniliga fyri at varða um munandi umhugsni til almenn ella privat áhugamál."*

Í fyrisitingarlógini § 26, stk. 1 verða nevnd dømi um viðurskifti, ið kunnu krevja tagnarskyldu hjá tí, ið virkar innan almennu fyrisitingina. Hesi nevndu viðurskifti geva góða ábending um, hvørjar upplýsingar skulu roknast sum trúnaðarupplýsingar, uttan tó at vera úttømandi.

*Til stk. 3.*
§ 3, stk. 2 um at almennir stovnar skulu samskifta umvegis Mínboks, um hesir senda viðkvæmar ella trúnaðarupplýsingar talgilt, er ikki galdandi, um almenni stovnurin samskiftir umvegis ein almennan portal, har likamligi persónurin ella løgfrøðiligi persónurin eintýðugt kann eyðmerkja seg á tryggan hátt.

Dømi um slíkan almennan portal kann vera Vangin, Borgaragluggin ella komandi virkisportalurin hjá Talgildu Føroyum.

Við eintýddari eyðmerking á tryggan hátt verður meint við Samleikan ella aðra skipan til eyðmerking við líknandi trygdarstøði.

*Til stk. 4.*
§ 3, stk. 2 um at almennir stovnar skulu samskifta umvegis Mínboks, um hesir senda viðkvæmar ella trúnaðarupplýsingar talgilt til viðskiftafólk, er ikki galdandi um tað fylgir av aðrari lóggávu.

Dømi um hetta kann vera, at tað við lóg verður ásett, at heilsuverkið skal samskifta við viðskiftafólk um heilsuviðurskifti við aðrari KT loysn.

**Til § 4**
*Til stk. 1.*
Øll, ið eru minst 15 ár og hava Samleikan, kunnu sjálvboðin tekna seg til Mínboks.

Samleikin er almenna føroyska KT skipanin til elektroniska eyðmerking av brúkarum og til elektroniska undirskrift og regulerаður í løgtingslóg um talgildan samleika.
Mínboks er ikki lógarkrav fyri likamligar persónar. Heimildin at viðgera persónsupplýsingar hjá likamligum persónur byggir á samtykki. Likamligur persónur skal vera væl kunnaður um,

hvussu hansara persónsupplýsingar verða viðgjørdar, og hetta verður gjørt í brúkstreytunum, ið likamligi persónurin skal samtykkja, fyri at gerast brúkari av Mínboks.

*Til stk. 2.*
Almennir stovnar kunnu ikki krevja, at samskifti við likamligar persónar skal verða umvegis Mínboks. Eitt tílíkt krav hevði kravt serskilda lógarheimild.

Orsøkin til hesa áseting er, at tað er ásett í stk. 1, at tað er sjálvboðið hjá móttakarum at nýta Mínboks.

Almennir stovnar skulu soleiðis framvegis bjóða viðskiftafólkunum at samskifta uppá á aðrar mátar enn talgilt, t.d. við vanligum pappírsposti ella við persónligar uppmøting.

**Til § 5**
*Til nr. 1)*
Hetta er ein av høvuðsásetingum í hesi lógaruppskoti.

Ásett verður, nær upplýsingar (t.d. boð, skjøl, avgerðir og fráboðanir), sendar umvegis Mínboks, roknast sum komnar fram. Hetta er týdningarmikið at áseta, soleiðis at samskifti umvegis Mínboks kann fáa sama rættarvirkna, sum postur sendur sum vanligur pappírspostur.

Tað kunnu vera fleiri føri, har tað er týdningarmikið at staðfesta, nær boðini eru komin fram, t.d.:

- um ein avgerð frá einum almennum stovni hevur eina kærufreist á t.d. 4 vikur, frá tí at avgerðin eru komin fram til borgaran ella
- í avtaluhøpi kann vera týdningarmikið at staðfesta, nær eitt tilboð ella svar uppá tilboð er komið fram, t.d. tá tilboðsgevari ásetir freist fyri at taka av tilboði (§ 2 í avtalulógini).

Við hesi løgtingslóg verður ásett, at upplýsingar, sendar umvegis Mínboks, roknast sum komnar fram ta løtu, tá upplýsingarnar eru atkomandi fyri móttakaran í Mínboks, júst sum við vanligum pappírsposti, har upplýsingarnar (brævið) eru komnar fram til móttakaran, tá upplýsingarnar liggja í fysiska postkassanum og eru atkomandi hjá móttakara. Tað er harvið óviðkomandi í hesum samanhangi, um móttakarin hevur lisið upplýsingarnar.

Løgtingslógin umfatar øll sløg av upplýsingum, ið verða sendar umvegis Mínboks, undir hesum upplýsandi tilfar og avgerðir, har tað er avgerandi, at boðini eru komin fram fyri at gerast bindandi fyri móttakaran og útrokning av kærufreist og annað.

Móttakarin hevur sjálvur ábyrgd av at kunna seg um tað, ið liggur sínari Mínboks. Tað hevur ongan týdning hesum viðvíkjandi, um móttakarin hevur trupulleikar við síni egnu teldu ella t.d. gloymt kotuna til Samleikan, tí hetta eru trupulleikar, ið móttakaranum hevur ábyrgdina av, og er nærmast til at loysa.

Um trupulleikar harafturímóti eru við Mínboks (t.d. KT skipanin handan Mínboks er niðri), so kann hetta merkja, at upplýsingar ikki eru atkomandi fyri móttakaran. Sama er galdandi um loysnin til innritan, Samleikin, er niðri, streymslit, einki internetsamband er í Føroyum o.a. Hetta eru trupulleikar, ið ikki liggja móttakaranum nærmast at loysa.

Tá forðingar eru, ið móttakarin ikki er tann nærmasti at loysa, og upplýsingarnar í Mínboks av tí orsøk ikki eru atkomandi, vera upplýsingarnar ikki roknaðar sum komnar fram til móttakaran, fyrr enn henda forðing er burtur.

*Til nr. 2)*
Sum fylgja av strongu krøvunum til rættleika, ið sett vera til Mínboks, verður ásett, at sending av upplýsingum, umvegis Mínboks, roknast sum at vera sendar av ásetta sendara.
Hetta merkir, at tað er ikki neyðugt fyri móttakaran á annan hátt at tryggja sær, at sendarin er annar enn tann ásetti sendarin.
Henda áseting ávirkar ikki møgulig formkrøv, ið kunnu vera í lóggávuni, um t.d. at eitt bræv skal sendast sum innskrivað bræv.

**Til § 6**

*Til stk. 1.*
Partur av heildarætlanini fyri Talgildu Føroyar er, at allir borgarar skulu hava ein talgildan postkassa til trygt samskifti, sum allir tænastuveitarar, almennir og privatir, skulu kunna senda til.

Tað er ein fortreyt fyri útbreiðslu av Mínboks í privata geiranum, at løgfrøðiligir persónar fáa heimild at fáa útflýggja og viðgera upplýsingar um persónstalið til eintýdda eyðmerking av móttakarum.

Orsøkin til hetta er, at p-talið verður nýtt sum eyðmerking av brúkarum í Mínboks umsitingarskipanini. Um ein løgfrøðiligur persónur ikki kann fáa p-talið, so er trupult at senda til rætta móttakara, t.d. um løgfrøðiligur persónur bert fær eitt fornavn og eftirnavn útflýggja at seta upp móti kundaskrá hjá viðkomandi løgfrøðiliga persóni, so er stórur váði fyri, at upplýsingar verða sendar til skeivan móttakara, av tí at fleiri nøvn eru afturvendandi.

Stk. 2. Skal tryggja, at løgfrøðiligir persónar viðgera p-talið á tryggan hátt.

Henda heimild gevur ikki privatpersónum heimild at fáa útflýggjað p-talið. Almennir stovnar hava heimild at viðgera p-talið sbrt. dátuverndarlógini og lóg um fólkayvirlit.

*Til stk. 2*
Við stk. 2. verður sett ein rímilig gátt fyri, hvør løgfrøðiligur persónur fær útflýggjað p-talið. Endamálið er at tryggja, at p-talið bert verður útflýggjað til ein løgfrøðiligan persón, ið hevur gott skil á sínari KT trygd.

Ein slík grannskoðan kundi verið ein ISAE 3000 váttan um viðgerð av persónsupplýsingum ella líknandi.

Orðingini” *hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk*” fylgir orðingini í galdandi dátuverndarlóg, sí t.d. § 37 og 41. Verkseting av hóskandi tiltøkum skal hvíla á eina váðagrundaða tilgongd.

Dømi um tøknilig tiltøk eru:
- Virusverja
- Firewall
- Logging
- Bronglan og dulnevning

Dømi um bygnaðarlig tiltøk eru:

- Skjalfestar mannagongdir
- Váðameting
- Tilnevning av dátuverndarfólki
- Nøktandi vegleiðing og upplæring til starvsfólkið

**Til § 7**
Mínboks er ikki ætlað sum ein miðil hjá fyritøkum til marknaðarføring.

Sum almenna talgilda skipanin kann væntast, at týðandi upplýsingar koma í Mínboks, so sum innkallingar til sjúkraviðgerð, avgerðir tiknar av fyrisitingini, ið broyta rættarstøðu borgarans o.s.fr. Mett verður tí ikki at tað er rætt, at blanda hetta saman við tilfar við endamáli at marknaðarføra ávísa fyritøku.

Um Mínboks eisini verður nýtt til marknaðarføring, er vandi fyri, ov nógvur óviðkomandi postur (spam) verður móttikin, ið ger, at týðandi upplýsingar til borgaran hvørva í rúgvuni. Til tess at virka fyri at Mínboks ikki verður nýtt í stríð við lýsingaforboðið, sbrt. § 7, er møguligt at revsa brot við sekt, ella um brot er framt fleiri ferð, kann viðkomandi missa rættin at at senda umvegis Mínboks.

**Til § 8**
Landsstýrismanninum verður heimilað at áseta reglur um nýtslu av Mínboks, undir hesum teknisk krøv umframt stødd og tal av fílum, sum í mesta lagi kunnu sendast pr. sending. Ætlanin við hesi áseting er, at landsstýrismaðurin kann áseta teknisk krøv viðvíkjandi nýtsluna av loysnini, t.d. krøv til formatir ella forrit o.a.

Tað er skilagott ikki at áseta teknisk krøv í sjálvan lógartekstin, men heldur geva landsstýrismanninum heimild at áseta nágreiniligari reglur. Orsøkin er, at teknisk krøv í lógarteksti kunnu virka sum eitt haft um beinið fyri at fáa ein smidliga og tíðarhóskandi loysn, ið lættliga kann verða tillaga nýggja tøkni.

**Til § 9**
Skotið verður upp, at lógin kemur í gildi, dagin eftir at hon er kunngjørd, undantikið § 3, stk. 2, ið landsstýrismaðurin setur í gildi við kunngerð. Orsøkin til hetta er, at geva eina skiftistíð til teir stovnar, ið nú skulu knýta seg í Mínboks.

Fíggjarmálaráðið, 4. januar 2023

**Ruth Vang**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason